# Oddagrein

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo



# SVANGASKARÐ AFTUR Í MIÐDEPLINUM



Fótbóltslandsliðið má mangan standa fyri skotum, tá ið úrslitini eru vánalig ella í mínsta lagi hálvvánalig. Framvegis hoyrast av og á viðmerkingar um, at føroyingar áttu ikki at spælt við í altjóða fótbólti – og argumentini eru kanska serliga, at úrslitini eru so vánalig, og føroyingar kunnu ikki standa seg í liðítrótti.

Tí hevur tað týdning – ikki minst fyri tey, sum varða av landsliðnum – at onkur góð úrslit eru av og á. Tað er ikki longur nóg mikið, at landsliðið stríðist væl, spælir væl, skorar eitt mál ella tapir heiðurliga. Treytirnar eru broyttar síðani 1990, nú snýr tað seg heilt einfalt um at fáa stig – at spæla javnleik ella vinna onkran dyst – áðrenn fólk kalla tað eitt gott úrslit.

Tað hava verið onkur long tíðarskeið, har føroyska landsliðið hevur fingið samanhangandi vánalig úrslit, og tað hevur lagt trýst á bæði liðið og tey rundan um. Men seinastu árini hava onkur góð úrslit verið, og tey hava rættiliga fløvað. Javnleikurin ímóti Eysturríki, sigurin á Litava og nú javnleikurin ímóti Norðurírlandi eru góð úrslit sum vísa, at tað ber til. Tá ið spælararnir stríðast alt, teir megnað, smáu marginalarnir spæla við, og hepnið eisini er í okkara parti, so ber til at fáa úrslitini, sum vit í grundini ikki áttu at fingið.

Seinastu tvey stóru úrslitini hevur føroyska landsliðið fingið á Svangaskarði, har føroyingar av fyrstan tíð spældu sínar altjóða heimadystir. Seinni fingu føroyingar eisini Tórsvøll sum møguleika til heimadystir, og tað verður verið gott tveimum leikvøllum, har landsliðið kann taka ímóti útlendsku liðunum.

Tað verður helst eisini soleiðis frameftir, at Føroyar koma at spæla á bæði Tórsvølli og Svangaskarði – alt eftir hvør mótstøðan er og nær dystirnir verða spældir. Men tað er ikki til at fjala útyvir, at Svangaskarð hevur verið pallurin fyri nakrar av størstu løtunum í landsliðsfótbólti, og tí má tað frameftir syrgjast fyri, at umstøðurnar eru góðar til altjóða fótbólt á Svangaskarði. Líka so væl, sum Fótbóltssambandið spælir við í menningini av Tórsvølli, má FSF eisini hugsa um, at Svangaskarð skal verða ein góður møguleiki til landsdystir.

**» Svangaskarð hevur verið pallurin fyri nakrar av størstu løtunum í landsliðsfótbólti**

## Eyðmjúkur út av sjúkrahúsi



Tíðindamaðurin og rithøvundurin, Høgni Mohr, hevur givið út bók um tíðina, hann var á landssjúkrahúsinum og eygleiddi lívið frá føðing til deyða.

Nakrar mánaðir í 2007 arbeiddi Høgni Mohr sum dokumentaristur á landssjúkrahúsinum. Frá leiðsluni fekk Høgni fullkomiligt frælsi at eygleiða og skjalfesta upplivingarnar, hann hevði saman við starvsfólkum, sjúklingum og avvarðandi.

Burtur úr eygleiðingunum hjá Høgna Mohr er nú sprottin í bók við átta frásigandi tekstum. Tekstirnir røkka heilt frá tí, at ein genta verður fødd, til at líkið av einum bráðdeyðum manni verður skorið upp.

»Tá deyðin verður avdúkaður« er 96 síður. Til allar greinirnar í bókini eru litmyndir, ið Jens Kristian Vang hevur tikið. Øgiliga egið forlag gevur bókina út. Forlag og høvundur takka Sosialinum fyri at hava royndarprentað greinirnar á sumri í 2008.

– Eg fór fattur og fordómssinnaður inn á landssjúkrahúsið men kom út aftur lútandi og eyðmjúkur. Hetta er mætasta journalistiska uppgáva, mær er litin til, sigur Høgni Mohr.

## Rósa setir hart móti hørðum

Skal verandi fíggjarkarmur haldast, hóast almennu lønirnar hækka í næstum, so spælir Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, ikki við meira.



– Eitt prosent í eini møguleikari lønarhækking hevur við sær eina eykaútreiðslu upp á 11,5 milliónir krónur fyri almannaøkið, og tað er vónleyst at finna teir pengarnar í sparingum, sigur Rósa Samuelsen.

– Skal eg gera eina sparing fyri úti við 12 milliónir krónur, so hongur systemið heilt einfalt ikki saman. Tað skulu ógvusligar sparingar gerast – veitingar mugu avtakast og hópuppsagnir gerast – og tað ber heilt einfalt ikki til, sigur landsstýriskvinnan.

Hon vil ikki staðfesta, at hon fer úr landsstýrissessinum, um hetta verða hennara treytir, men tað kann næstan hoyrast millum orðini – lesast millum reglarnar.



**» ABC melur runt uttan mál ella mið**

HØGNI HOYDAL
KJAK SÍÐA 10



**» Nyttar ikki at gera umstøður hjá læknum verri**

JAN RASMUSSEN
KJAK SÍÐA 11

## Jenis og Karsten hava spælt við

Jenis av Rana finnist harðliga at lønunum, sum læknar fáa fyri forvaktir á sjúkrahúsum. Sosialurin skrivaði fríggjadagin, at læknar kunnu fáa upp í 56.000 krónur í vikuløn fyri hesa vakt. Hetta heldur Jenis av Rana er fullkomiliga órímligt. Hann kallar lønin svakliga.

Men Jenis av Rana hevur kanska ein lítlan fingur við í spælinum, og partamaður hansara í løgtinginum hevur eisini verið uppi í leikinum.



Í 1990'unum var Jenis av Rana formaður í felagnum hjá yngru læknum, og tá stríddist hann fyri teirra rættindum. Karsten Hansen, sum fyri nøkrum árum síðani skifti úr Tjóðveldi til Miðflokkin, hevur vegna Fíggjarmálaráðið undirskrivað núverandi sáttmálar hjá læknunum. So tey í Miðflokkinum hava eisini havt eitt sindur av ávirkan á høgu lønirnar, sum læknar kunnu fáa fyri forvaktir á sjúkrahúsum.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo